Neistin-StÍF 24-26 (11-9):

# Neistin kløkkaði strandingar

**Leingi hevði Neistin eitt sera gott tak á StÍF, men seinastu 20 minuttirnar prógvaðu favorittarnir sítt virði**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einasti dysturin, sum Neistin hevur vunnið hetta kappingarárið, var í fyrsta umfarinum av grundspælinum, tá StÍF vitjaði.

Sunnudagin var um reppið, at bláu menninir endurtóku tann sigurin, tá StÍF vitjaði.

Strandingar vóru nakað skerdir, nú Leivur Justinussen ikki fekk spælt, og leingi tóktist heimaliðið at hava ein heilt greiðan fyrimun av hesum.

Neistin byrjaði dystin væl, og tað gjørdi ikki støðuna verri, at Marian Cirloganescu miðskeiðis í fyrra hálvleiki fekk reytt kort. Hetta tá hann leyp út eftir púra blanka Trónda Kragesteen, sum var í kontra-álopi.

Eitt skifti eftir hetta tóktist eisini, sum skuldi Neistin veruliga renna frá StÍF. Teir vunnu seg upp á 10-5, men seinastu løtuna undan steðginum fingu strandingar tó aftur fatur á rætta endanum.

Og eftir steðgin kom so av álvara ferð á vanliga ferðmiklu strandingarnar. Eina løtu megnaði Neistin at fylgja teimum, men um miðjan hálvleikin skrædnaði av álvara. Úr 17-14 broyttist støðan til 19-24, og so vóru týdningarmiklu stigini mest sum vís. At Neistin seinastu løtuna minkaði um munin, mundin bila minni í so máta. Strandingar eru framvegis bert tvey stig aftan fyri odda-vinna næsta vikuskifti, tá teir spæla móti KÍF, fer tað at síggja so heilt hampuligt út hjá teimum.



*Tróndur Kragesteen var í nógvum førum ein stór hóttan móti StÍF. Men í longdini var hetta tó ikki nóg mikið hjá Neistanum, sum tó s‡ndi framstig í spælinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-StÍF 24-26 (11-9)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Blagoje Buha 10(1), Tróndur Kragesteen 5, Birgir Poulsen 4, Karl Oddmar Rasmussen 2, Dann Thorleifsson 1, Roar Dalsgarð 1, Kári Horn 1
**StÍF:** Alexandur Johansen 8(6), Artur Johansen 5, Bent Djurhuus 3, Borgar Danielsen 3, Bárður Danielsen 2, Jørmund Joensen 2
**Brotskøst:** Neistin 1, StÍF 9
**Útvísingar:** Neistin 6, StÍF 2
**Diskvalifikatión:** StÍF 1 (Beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason



*Síðani 14. apríl hevur talan verið um uppvenjing hjá Inga Olsen. Nú er hann við aftur, og tað munnu bæði Ingi sjálvur og vestmenningar sum heild vera fegnir um*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Vildi spæla aftur

**- Eg segði ongantíð, at eg fór at gevast. Men eg segði, at eg fór at umhugsa støðuna, sigur Ingi Olsen, sum nú aftur er partur av besta mansliðnum hjá VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá tú sum 37 ára gamal fært ein somikið álvarsligan skaða, at skurðviðgerð og langur steðgur er neyðugt, munnu tey flestu hugsa, at hetta var tað. Í øllum førum, um talan er um ítróttarfólk í fremstu røð.

Men Ingi Olsen er kanska ikki sum tey flestu. Í øllum førum er hann nú aftur at síggja á besta mansliðnum hjá VÍF, og leygardagin enntá í avgerandi leikluti.

Sjálvur leggur hann tó dent á, at hann ongantíð staðfesti, at hann fór at gevast, tá hann í vár varð lagdur undir skurð.

– Talan var sjálvandi um álvarsligan skaða. Og eg umhugsaði sjálvur støðuna væl og virðiliga.

– Mær dámar tó somikið væl, at spæla hondbólt. Og eg kenni eisini meg sjálvan somið, at ongantíð vildi melda út, at eg fór at gevast, sigur hann.

Síðani á summarmála, tá armurin slapp úr fatli, hevur talan so verið um strævna uppvenjing. Og hóast armurin enn ikki hevur somu styrkina, so heldur hann, at hann nú væl er førur fyri at spæla.

– Eg veit ikki, um armurin nakran tíð endurvinnur fullu styrkina, men tað kann eg liva fyriuttan. Tað týdningarmesta er, at eg kenni meg ikki í størri vanda enn allir aðrir spælarar. Eg eri ikki bangin fyri, at sami skaðin aftur skal gera um seg, um eg eitt nú verið takláður, so í so máta eri eg klárur, sigur spælarin, sum ikki so mikið sum spældi ein dyst við sonevnda oldboys liðnum hjá VÍF. Tað vil siga liðnum, har flestu av eldru liðfeløgunum hjá Inga í dag hugna sær við hondbóltinum.

– Eg spældi eitt lítið sindur við móti Neistanum seinasta dystin í grundspælinum. Og so spældi eg aftur hetta vikuskiftið. Undir venjingini hevur málið alla tíðina verið, at eg skuldi koma fyri meg aftur kropsliga. Tað hevur tíbetur eydnast, og beint nú eri eg bara fegin um aftur at vera ein partur av liðnum, sigur Ingi Olsen at enda.

KÍF-VÍF 24-27 (11-10):

# Ingi vendi dystinum

**Leingi argaðu kollfirðingar, men tá Ingi Olsen varð sendur á vøllin, fekk VÍF vent dystinum til egnan fyrimun**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er nærum eitt ár síðani, at VÍF í steypafinaluni fekk eitt álvarsligt skot fyri bógvin. Slitið í økslini hevði leingi argað Inga Olsen, men bert fáar minuttir inni í steypafinaluni, var nóg mikið. Ingi noyddist av vøllinum, og eftirfylgjandi varð hann lagdur undir drúgva skurðviðgerð.

### KÍF argaði

Tey flestu mundu tá halda, at hetta samstundis markeraði endan á aktiva leiklutinum, sum Ingi hevur havt í føroyskum hondbólti seinastu 20 árini. 20 ár, har VÍF støðugt hevur verið partur av føroyska oddinum, og - aloftast - við Inga Olsen í einum sentralum leikluti.

Seinasta dystin í grundspælinum var Ingi tó aftur partur av VÍF-liðnum, tá VÍF spældi móti Neistanum. Tað ferðina var leikluturin kanska ikki so eyðsýndur, men tað var hann, tá VÍF leygardagin vitjaði hjá KÍF.

Fyri steðgin vildi nevnliga lítið og einki bera til hjá VÍF. KÍF hevur ofta argað grannarnar fyri norðan, og soleiðis tóktist eisini vera hesaferð. Hóast spælið ikki var flótandi, so stríddust undirtippaðu heimamenninir væl, og frustratiónirnar hjá VÍF gjørdust spakuliga alt sjónligari.

Hetta broyttist tó, tá Ingi Olsen varð sendur á vøllin. Enn er dystarvenjingin kanska ikki so góð, sum hon hevur verið. Men eyga fyri spælinum og evni at stýra hevur hann enn sum fáur. Og hessir eginleikar vóru týdningarmesta orsøkin til, at VÍF fekk koppað dystinum til egnan fyrimun.

Sjampanjuhondbólt gjørdist talan kanska ikki um. Men teir fingu stigini, sum skuldu til, og enn eru teir partur av bólkinum, sum eltir annan av finalusessunum í Atlantic Airways-kappingini.



*Leingi høvdu vestmenningarnir tað sera strævið, men at enda fingu teir kortini knógvað kollfirðingunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA UM DYSTIN

**KÍF-VÍF 24-27 (11-10):**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Røgvi Weyhe 5, Petur Martin Poulsen 5, Arnbjørn Hansen 5(2), Sune Davidsen 4, Gert Hansen 3, Mirco Milenkvic 1, Karl Jóhan Dhurhuus 1
**VÍF:** Sámal Joensen 9, Áki G. Olsen 6, John Zachariassen 5, Sjúrður Poulsen 3, Agnar Joensen 2, Harald Bjørgvin 1, Ingi Olsen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, VÍF 2
**Útvísingar:** KÍF 5, VÍF 4
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (Beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen